# Eitt ára fongsul fyri harðskap

**Føroya Rættur dømdi hósdagin ein 40 ára gamlan mann eitt ára treytaleysa fongsulsrevsing fyri harðskap móti fyrrverandi unnustu síni og fyri at royna at hótta vitni**

POLITIMÁL
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tann 40 ára gamli maðurin var ákærdur fyri í fleiri førum at hava sligið fyrrverandi unnustuna hjá sær, og í tí eina førinum var ákæran harðskapur av serliga grovum slag. Maðurin hevði nevnliga skallað unnustuna hjá sær, meðan hann var í fallhjálmi.

### Royndi at ávirka úr fongslinum

Longu tann 30. oktobur í fjør var tann 40 ára gamli maðurin varðhaldsfongslaður fyri harðskap móti unnustuni hjá sær.

Meðan maðurin hevur sitið varðhaldsfongslaður, hevur hann úr fongslinum roynt at ávirka fyrrverandi unnustuna, soleiðis at hon ikki skuldi vitna móti honum. Millum annað hevði maðurin lænt eina fartelefon, sum ein annar fongslaður persónur hevði smuglað við sær inn í fongslið. Fartelefonina nýtti hann so at ringja til fyrrverandi unnustuna, og hann hevur eisini smuglað hóttanarbrøv út úr fongslinum.

Linda Hesselberg, ákæri, greiðir frá, at løgreglan bleiv varug við hetta síðst í farnu viku, og tí bleiv maðurin isolatiónsfongslaður seinasta fríggjadag, so at hann ikki kundi hótta vitni enn meira.

### Ákæruvaldið umhugsar at kæra

Tann 40 ára gamli maðurin er í fýra førum dømdur fyri harðskap, og í tveimum førum er eisini dømdur fyri at royna at ávirka vitni.

Eftir at Føroya Rættur hósdagin dømdi mannin eitt ára treytaleysa fongsulsrevsing, bað ákæruvaldið rættin um, at maðurin framhaldandi skuldi sita varðhaldsfongslaður, tí ákærin metti vanda verða fyri, at harðskapurin skuldi endurtaka seg. Hesum ynski gekk rætturin á møti, og tí situr tann 40 ára gamli framvegis handan rimar.

– Hetta er heldur sjáldsamt mál, og tað er ikki so ofta, at kvinnur, ið verða útsettar fyri slíkan harðskap, tora at standa fram. Tað gjørdi kvinnan í hesum førinum tó, og tað eigur hon rós fyri. Vit eru tó ikki heilt nøgd við dómin, og vit umhugsa avgjørt at kæra dómin, sum vit halda verða ov linan, greiðir Linda Hesselberg frá.

# Seks ær skotnar



*Løgreglan hevur ongar slóðir at ganga eftir í málinum um seks ær, sum vóru funnar skotnar hósmorgunin.*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

**Hósmorgunin fekk ein maður á Tvøroyri ein ordans hvøkk, tá ið hann fór at geva seyðinum hjá sær. Tá ið maðurin kom á staðið, møtti honum ein óhugnalig sjón. Seks ær lógu skotnar í bønum**

POLITIMÁL
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í fyrstu atløgu kundi ikki staðfestast, at seyðurin var skotin, men eftir ein seyður var sendur til djóralækna í Havn til kanningar, bleiv staðfest við vissu, at seyðurin er skotin.

### Eingin undir illgruna

Sommer Joensen, sýslumaður í Suðuroy, sigur, at løgreglan hevur funnið fleiri hylki frá riflupatrónum á staðnum, men at løgreglan annars stendur á berum í málinum.

– Tað er eingin, sum hevur sæð nakað, og tí standa vit ógvuliga illa í tí. Vit hava í løtuni ongan undir illgruna, men vit vóna, at tað er onkur, sum veit okkurt og boðar okkum frá. Slíkt sum hetta er fullkomiliga sjúkligt, heldur Sommer Joensen.

Sýslumaðurin greiðir frá, at seyðurin er skotin í tíðarskeiðinum frá klokkan sjey mikukvøldið til klokkan tíggju hósmorgunin.

– Tann eini eigarin var og gav seyðinum klokkan sjey mikukvøldið, og tá ið hann klokkan tíggju hósmorgunin aftur fór at geva seyðinum, sá hann ræðuligu sjónina, so tað er í hesum tíðarskeiði, at onkur hevur gjørt av við seyðin, greiðir Sommer Joensen frá.



*Tað var sera nógvur vindur í Skálabotni hósmorgunin, tá ið hesin trailarin hjá HT Transport feyk út av vegnum.*
*Mynd: Bergur Østerø*

# Trailari feyk av vegnum

**Í nógva vindinum beint fyri døgurða hósdagin feyk ein trailari hjá HT Transport út av vegnum í Skálabotni.**

POLITIMÁL
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað var rættuliga fitt av vindi í Skálabotni hósmorgunin, og tað fekk ein trailari hjá HT Transport eisini at merkja.

### Lyftur upp frá vegnum

Eitt eygnavitni til tilburðin greiður frá, at tað sá rættuliga ógvusligt út, tá ið óhappið hendi.

Maðurin greiðir frá, at vindurin tók í vognin á trailaranum, sum var tómur. Vognurin, sum er fýra metrar langur, bleiv lyftur upp frá vegnum og rakti lampuna á einum elsteyra. Lampan á elsteyranum er eini seks metrar oman fyri vegin, og havandi í huga longdina á vogninum merkir tað, at vognurin bleiv lyftur einar tveir metrar upp frá vegnum.

Tilvildin vildi tað so, at ein veghøvil hjá Landsverk koyrdi beint aftan fyri trailaran, sum fór út av vegnum. Veghøvilin fekk sett eina reim á vognin, og á tann hátt eydnaðist tað at fáa trailaravognin upp á vegin aftur. Av tí at tað gekk so mikið skjótt, var vegurin í Skálabotni ikki blokeraður í meiri enn slakan hálvan tíma.

# Løgreglumaður á varðhaldi

VAKTARHALD
*Eirikur Lindenskov*
*Eirikur@sosialurin.fo*



*Løgreglumaðurin Helgi Justinussen hevur keypt ansingarfelagið Ansni*

Frá ársbyrjan at rokna verður tað Helgi Justinussen í Havn, sum eigur og rekur vaktarfelagið ANSNI. Hann hevur keypt felagið frá John Johnsson, sum hevur stovnað og stjórnað felagnum seinastu árini.

Helgi Justinussen er løgreglumaður í Havn og býr á Argjum. Hann fer í farloyvi úr løgreglustarvinum, men til hesi viðurskifti verða í lagi, verður tað konan, Aimi Justinussen, sum verður stjóri í fyritøkuni.

Vaktarfelagið fram framhaldandi at bera navnið ANSNI, og flestu starvsfólkini halda fram í nýggja felagnum.

– Tað er fyri at royna nýggjar avbjóðingar, at eg eri farin undir hetta, sigur Helgi Justinussen, sum beinanvegin kastar seg yvir arbeiðið. Hann hevur frítíð og frígongu tilgóðar og kann tí fara undir vaktararbeiðið beinanvegin. Tá hann formelt er farin í farloyvi, tekur hann við stjórn felagsins.

Helgi Justinussen er 39 ára gamal og byrjaði sum løgreglunæmingur í 1987. Hann hevur starvast í Havn mestu tíðini, tó eitt skifti í Klaksvík og eitt skifti í Valby í Keypmannahavn.